## Funnu stóra rottu

Fólk hjá danska skógar- og náttúrustýrinum fingu í síðstu viku eina óvanliga stóra rottu í eina fellu í Skjern Enge í Vesturjyllandi. Eitt er, at rottan var óvanliga stór, men hetta er eisini fyrsta rottan, sum er funnin í Skjern Enge. Niels Lisborg hjá skógar- og nátúrustýrinum sigur, at rottan var 45 centimetrar long, tá halin var toygdur. Tíverri bleiv rottan ikki vigað, men hildið verður, at hon vigaði minst eitt hálvt kilo. Tað vanliga er 250 gram.



*Tann stóra rottan vigaði helst eitt pund*

*Mynd: DR)*

## Ísland ræðumynd

Í einari grein í bretska blaðnum Sunday Herald verða skotar ávaraðir ímóti at loysa frá hinum partinum av Bretlandi, tí sambært blaðnum kunnu skotar koma í somu støðu sum íslendingar. Sagt verður, at Ísland hevur nógvan fisk, nógva orku o g eina stóra ferðavinnu, men at landið kortini hevur búskaparligar trupulleikar. Orsøkin er sambært Sunday Herald, at Íslandi er ov fáment til at standa einsamalt, og tað sama er Skotland, skrivar blaðið.

# Láni-veitslan er av

**Altjóða fíggjarkreppan og búskaparútlitini gera, at óvissan er størri enn vanligt, tá metast skal um føroysku búskaparútlitini. Og tað er ivasamt, um tað almenna framhaldandi kann virka sum lokomotivið, ið skal stimbra búskapin, sigur Landsbankin í seinastu frágreiðing sínari**

BÚSKAPUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Óvissa á fíggjarmarknaðinum, misjøvn rávørutilgongd í tilfeingisvinnuni, fløskuhálsar á arbeiðsmarknaðinum og ivi um framtíðar leiklutin hjá landinum í stimbran av búskapinum.

Ávaringalampurnar blunka í fullari ferð í seinastu frágreiðingini frá Landsbankanum.

### Lániveitslan av

Í frágreiðingini verður sagt, at fremsta orsøkin til búskaparvøksturin seinastu tvey-trý árini vøksturin í innlendskum eftirspurningi.

- Betri fíggingarmøguleikar á fíggjarmarknaðinum og skattalætti til húsarhaldini hava stimbrað nýtslu og íløgur. Hetta hevur serstakliga ávirkað virksemið í tænastu- og byggivinnuni. Landið og kommunurnar hava økt tænasturnar lutfalsliga nógv. Ávísar bygnaðarligar broytingar í pørtum av vinnulívinum hava harumframt virkað fyri meira dynamikki. Størsta ávirkanin á uppgongdina seinastu 2 árini hevur verið størri nýtsla og íløgur hjá húsarhaldunum.

Hinvegin hava trupulleikar verið á útboðssíðuni. Millum annað við misjavnari rávørutilgongd í tilfeingisvinnuni, tó at framleiðsluvøkstur hevur verið í alivinnuni. Hartil hevur trýstið á arbeiðsmarknaðin verið stórt.



*Enn eru bankarnir bundnir av givnum tilsøgnum, og tí verður talan ikki um nakran veruligan steðg í búskaparvøkstrinum her og nú. Men roknast kann við, at bankarnir í framtíðini verða varnari í lángeving sínari, sigur Landsbankin í frágreiðing sínari*

### Einki búskaparstopp

Enn er talan tó ikki um nakað veruligt stopp í búskapinum. Landsbankin metir framvegis, at talan verður um búskaparvøkstur, og er hesin mettur til 4,7% í 2008.

- Fíggjarkreppan og búskaparútlitini úti í heimi gera, at óvissan er størri enn vanligt, tá metast skal um útlitini í føroyska búskapinum. Búskapurin í 2008 kann í stóran mun væntast at vera framhald av gongdini frammanundan. Millum annað tí peningastovnarnir í ávísan mun eru bundir av givnum tilsagnum um útlán. Longur frammi í tíð kunnu lánistovnarnir væntast at verða meira varnir at økja um útlánini, eins og hægri fíggingarkostnaður í eina tíð frameftir kann væntast at minka áhugan fyri lántøku. Hetta kann væntast at gera seg galdandi fyri bæði húsarhald og vinnulív, verður sagt í frágreiðingini.

Hartil verður sett spurnartekin við, um tað almenna framvegis kann stimbra búskapin í sama mun, sum gjørt hevur verið seinnu árini, tá skattalættar og vaksandi rakstrarútreiðslur hava økt búskaparvøksturin.

## Tørvur á køling

Hóast talan er um fleiri negativ signal í seinastu frágreiðingini, so heldur landsbankastjórin, Sigurd Poulsen, ikki, at ávaringalampurnar eru blóðreyðar.

- Fyrst og fremst, so ger altjóða støðan, at ivamálini í dag eru størri, enn tey vanliga hava verið. Hartil hava vit í eina tíð havt ein óvanligan búskaparvøkstur við øktum fiskaprísum, øktari privat-nýtslu og øktari almennari nýtslu.

- Tí hevur búskapurin faktiskt verið ov heitur, og ein køling nú er tí góð fyri okkum, sigur Sigurd Poulsen.

- Tosað vit um framtíðina, so er óvissan tó hampuliga stór. Tað kann ikki roknast við, at privatu húsarhaldini økja meira um sína nýtslu. Partvíst tí rentan er økt, og partvíst tí fíggjarstovnar helst verða varnari við sínum lánitilboðum.

- Og hjá tí almenna eru eisini langsiktað mál at taka atlit til. Ikki minst er tað kravið um at fíggja eitt framtíðar samfelag, har vit gerast fleiri og fleiri eldri. Tí noyðist landið at leggja meira pening til síðis, og tað avmarkar sjálvandi møguleikarnar at stimbra um búskapin, tá niðurgongd er í hesum, sigur Sigurd Poulsen.

**-mørk**

# Løgmaður oman fyri vatnskorpuna

**Fríggjakvøldið tenraði listamaðurin - og provokatørurin, Ole Wich ein lasara í einum vita úti á Tinganesi, sum stendur í sjey metra hædd**

UMVØRVISÁTAK
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Endamálið er at vísa, hvussu nógv vatnstøðan hækkar, um grønlendski innlandsísurin bráðnar. Tá fara heimsins høv at hækka sjey metrar, og



*Rípan á vindeygunum á fyrstu hædd á Skansapakkhúsinum – fundarhølinum hjá løgmanni - vísir, hvar vatnskorpan verður, um innlandsísurin bráðnar – og heimshøvini hækka sjey metrar*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

skal lasarstrálan í Tinganesi vísa, hvussu vorðið verður í Havnini tá. Skrivstovan hjá løgmanni er á triðju hædd, so hann hevði verið turrføttur. Fundarhølið hjá løgmanni hevði kortini verið undir eins og meginparturin av Skansapakkhúsinum, sum hýsir løgmanni og hansara fólki.

Ole Wich sigur, at hann hevur gjørt hetta tiltakið til tess at vísa á, at vit altíð so fegin vilja spæla við, tá vit fáa nakað fyri einki, men so skjótt vit sjálvi skulu lata nakað, so fær pípan annað ljóð. Ole Wich heldur, at Føroyar eiga at undirskriva Kyoto sáttmálan beinanvegin.

Tað er í samstarvi við Dimmalætting og Balslevs Timburhandil, at Ole Wich hevur sett upp lasaran, sum skal lýsa hesar dagarnar, TACC klimaráðstevnan er í Norðurlandahúsinum.

Tað er sjálvandi ikki av tilvild, at listamaðurin hevur valt sær Tinganes til hetta friðarliga mótmæli.

- Á Tinganesi hava føroyingar hildið ting í øldir, og higani verður landið framvegis stýrt. Tað er eisini fantastiskt, at lasarstrálan eisini kann lýsa á sjálvan mannin, sum átti at havt undirskrivað Kyotoavtaluna, sigur Ole Wich.